## Henry uttan revsing

Nú er tað endaliga avgjørt, at Thierry Henry verður ikki revsaður fyri tilburðin, tá hann brúkti hondina í samband við sigursmálið, sum tryggjaði Frankaríki luttøku í HM-endaspælinum og sendi Írland út í kuldan. Nógv hevur verið sagt og skrivað um hendingina. Írland hevur kært sín neyð, kravt umdyst og søkt um eyka pláss til HM-endaspælið. Alt til fánýtis og nú er eisini greitt, at høvuðspersónurin í øllum málinum. Thierry Henry, heldur ikki verður revsaður. Henry hevur síðani viðgingið, at hann tilvitað brúkti hondina, men lukkutíð fyri hann sá hvørki dómari ella linjuverjin hetta, og tað metir FIFA vera ógvuliga avgerandi í hesum sambandi.



## West Ham selt

David Sullivan, sum hevur ríkað seg upp av tíðindabløðum og vaksnamannaundirhaldi, hevur keypt helvtina av enska Premier League-felagnum, West Ham. Til í 2008 taldist Sullivan millum teirra, ið áttu eitt annað felag, Birmingham, men hann hevur ongantíð dult, at hugur hansara stóð til West Ham. – Mær dámdi væl at stjórna Birmingham í gott og væl 16 ár, men øll vistu, at hjarta mítt lá í West Ham, sigur David Sullivan, ið longu hevur tikið ein av hinum fyrrverandi eigarunum í Birmingham, David Gold, við sær upp í nýggju nevndina í West Ham.

# Norskir menn í kvinnuskugga

**Norska manslandsliðið, sum er við í bólki A, hevur veruliga livað í skugganum av norska kvinnulandsliðnum, sum hevur vunnið óteljandi heiðursmerki**



heris@sosialurin.fo
Heri Simonsen

Noreg er norðurlendska íkastið í bólki A, har teir eru í bólki saman við Kroatia, Russlandi og Ukraina. Norska manslandsliðið hevur veruliga livað í skugganum av norska kvinnulandsliðnum, sum hevur vunnið óteljandi heiðursmerki. Besta úrslitið hjá norsku monnunum er sætta plássið, sum Noreg vunnið í EM-endaspælinum á heimavølli í 2008.

Noreg vann seg ikki til olympisku leikirnar í Beijing, og til seinasta HM-endaspæl endaði Noreg á einum níggjunda plássi. Millum eyðsýndu profilarnir hjá Noregi eru málverjin, Steinar Ege, Kristan Kjelling, Frank Løke og Erlend Mamelund.

Kroatia hevur eitt sera sterkt lið. Í 2003 vann Kroatia HM-gull, og í 2004 vann liðið OL-gull. Síðani 2003 er eitt fimta pláss ringasta endastøða, sum Kroatia hevur havt til eitt endaspæl. Venjarin, Lino Cervar er ovurhonds íðin í sínum venjarayrki, og er tað ikki so sjáldan, at hann fær ávarðing ella verður vístur av vøllinum. Á vøllinum er tað Ivano Balic, sum er sanna heimsstjørnan. Balic er ein hin besti tekniski hondbóltsspælarin í heiminum.

Í EM-kvalifikasjónini slapp føroyska liðið at smakka hvussu sterk russiska hondbóltsbjørnin er. Spælarar, sum Egor Evdokimov, Vitaly Ivanov, Eduard Koksarov og Vasily Filippov fara at gera sítt til at Russland aftur kann vinna seg uppá heiðurspallin. Russland hevur ikki vunnið nakað heiðursmerki síðani OL-bronsuna í 2004.



**Stian Vatne úr Noregi stríðist við Mattias Gustafsson úr Svøríki í EM-aðalroyndini millum norðurlondini bæði, sum var í Oslo Spektrum leygardagin, tá Svøríki vann við fýra málum, 32-28**

Mynd: Erlend Aas/Scanpix

# Svøríki saknar skreyt

**Svøríki, sum er komið í bólk saman við Týsklandi, Póllandi og Slovenia, hevur einki heiðursmerki vunnið síðani EM-gullið 2002**



heris@sosialurin.fo
Heri Simonsen

Svøríki var eitt hondbóltsstórveldi í 90-unum, men síðani EM-gullið á heimavølli í 2002, hava svenskarar einki heiðursmerki vunnið. Stóra legendan, Staffan Olsson, er saman við Ola Lindgren vorðin venjari hjá Svøríki, og teir hava nógv at læra frá sær.

Tað verður tað eisini tørvur á, tí Svøríki er komin í bólk saman við Týsklandi, Póllandi og Slovenia. Millum berandi spælarnar hjá Svøríki eru Johan Olof Ask, Jonas Källman, Oscar Carlén og Kim Andersson.

Týskland vann HM á heimavølli í 2007, men hevur síðani skuffað sína stóru viðhaldsfjøld. Venjaralegendan við tí stóra yvirskegginum, Heiner Brand er framvegis venjari hjá Týsklandi. Mett verður, at spælarar sum Johannes Bitter, Holger Glandorf, Michael Kraus og Oliver Roggisch verða avgerandi í roynd unum hjá Týsklandi at vinna seg á heiðurspallin aftaná. Bent Nyegaard metir hendan innleiðandi bólkin at verða tann mest javna bólkin á pappírinum.

Í bólki D eru olympisku meistarnir og heimsmeistarnir úr Fraklandi saman við Spania, Ungarn og Kekkia. Sunnudagin vann Frakland heili 35-25 á Íslandi í finaluni í einari venjingarkapping í París.

30 ára gamli, Daniel Narcisse er tað sama fyri hondbóltin í Fraklandi, sum Zidane varð fyri fótbóltin. Oddsini uppá, at Frakland vinnur EM, eru heilt niðri á 2,5, og ikki uttan orsøk. Venjarin, Claude Onesta hevur aftur eitt sterkt lið, sum kann fara allan vegin.

Bent Nyegaard metir ikki, at Ungarn og Kekkia eiga at hótta Frakland og Spania.